# Føroyingar vilja heim til jóla

**Hjá Atlantic Airways merkist, at føroyingar, ið eru fjart av landi skotnir, fegnir vilja heim til jóla. Frá í dag og til jóla, væntar Atlantic Airways at flyta 3600 føroyingar heim at halda jól**



Føroyska flogfelagið Atlantic Airways hevur alstóran týdning fyri samband føroyinga við útheimin.

Og nú jólini eru í hondum, merkist heilt greitt, at føroyingar eru fegnir um møguleikan, sum føroyska flogfelagið veitir. Atlantic Airways er í dag einsamalt at røkja sambandið við útheimin loftvegis.

## Skeivur eftirspurningur

Tó tað er hugaligt, so er talan um ein sonevndan skeivan eftirspurning, nú jólini eru í hondum.

Nógv inngangandi, og fá útgangandi. So einfalt kann tað sigast. Flogfør fara so at siga tóm niður til Danmarkar, og aðrastaðni, eftir fólki, ið vilja heim til jóla.

Frá í dag, og til jóla, fara 41 flogfør at flyta 3600 fólk til Føroya. Flogið verður frá 7 ymsum støðum, nevniliga Reykjavík, Aberdeen, London, Oslo, Billund, Aalborg og Keypmannahavn.

## Pláss eftir enn

Hóast fleiri flogfør eru full og útselt er, so eru ongir dagar, har proppur er í. Enn eru pláss eftir í summum flogførum.

Frá í dag og til 23. desember flytir Atlantic Airways sostatt 3600 fólk, ella meira, til Føroya úr sjey ymiskum støðum á jarðarknøttinum.

Og sjálvandi: úr Føroyum og út í heim er ongin trupulleiki at fáa ferðaseðil.

## Vilja heim til jóla

Talan er um á leið sama tal, sum í fjør, men kanska er tað eitt lítið sindur minni. Men enn er ongin proppur í, og pláss eru eftir. Eisini er tað gjørt so, at roynt verður at taka hædd fyri møguligum útsetingum orsakað av veðrinum, og tí eru síðstu komurnar settar at verða tann 22. og 23. desember.

Í januar er meira javnvág í ferðingini, og tey ferðandi eru javnari býtt á ymsu flogferðirnar.

Men eftir stendur, at føroyingar fegnast um flogsambandið og fegnir vilja heim til jóla.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















